**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Fjarðakanning. Túrur nr. 0760**
**Tíðarskeið 27/8-28/8 2007**

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Eilif, Karina og Gunnvør frá FRS,
Jógvan Fróði, Birna og Regin frá Biofar,
Katrin og Heidi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

**Ábyrgd:** Eilif

**Endamál:**
At gera kanningar uppi í sjónum, kanna botndjór og sedimentkanningar í firðum.

**Útgerð:**
*Sjógvkanningar*:
CTD + fløskur, FastTracka, útgerð til primærproduktión, klorofyl útgerð, titreringsútgerð til oxygen.

*Botnkanningar:*
HAPS botnheintari, grabbi, elektrodur til pH og redox potentiali og sýlir.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini tann 27/8 norð í Sundalagið sunnan fyri Streymin, Tangafjørð, Kollafjørð, Kaldbaksfjørð og Skálafjørð. Støðirnar eru vístar á talvu 1. Uppi í sjónum mátaðu vit hita, salt, fluorescens og ljós við CTDini, vit mátaðu oxygen (Winkler titrering) og tóku prøvar til nitrat og klorofyl. Á botni vórðu grabbar tiknir fyri at kanna botndjór, og HAPS prøvar til máting av pH og redox potentiali í sedimentinum og fyri at taka sedimentprøvar til Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Á Kaldbaksfirði varð harumframt mátað gróður ($^{14}$inkubatión og við Fasttracka).

Tann 28/8 varð farið í Sundalagið norðan fyri streymin til somu kanningar og at enda varð farið aftur á Kaldbaksfjørð eftir sedimentkjarnum (HAPS) til nærri kanningar á Fiskirannóknarstovuni (Gunnvør). Í teimum kjarnunum varð mátað fluxar av oxygen, ammonium, nitrat og kolevni, pH og redox poentiali, poruvatn og lívrunnið innihald í sedimentinum.

**Støðir og reiðskapur:**
Støðirnar, har fjarðakanningar vórðu gjørdar, og hvør reiðskapur varð brúktur, er víst á mynd 1 og talvu 1.




Mynd 1. Støðirnar á fjarðakanningini 2007.

Talva 1. Støðir og prøvar á fjarðakanningini.

| Støð | Pos. | | Botndýpi (m) | CTD | HAPS | Grabb |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Sundalagið Suður | | | | | | |
| SU 05 | 62°04,20 N | 6°47,80 V | 74 | X | X | X |
| SU 15 | 62°08,61 N | 6°52,00 V | 39 | X | | X |
| Við Flesjarnar | 62°03,8 N | 6°46,1 V | 70 | | X | 5 X |
| Tangafjørður | 62º03,65 N | 6º46,5 V | 76 | | X | |
| | | | | | | |
| Kaldbaksfjørður | | | | | | |
| KA 01 | 62°03,59 N | 6°47,81 V | 40 | X | | 5 X |
| KA 05 | 62°03,35 N | 6°49,19 V | 54 | X | X | X |
| KA 06 | 62°03,31 N | 6°50,30 V | 38 | X | | |
| KA 07 | 62°03,16 N | 6°50,08 V | 52 | X | | |
| KA08 | 62°03,10 N | 6°49,80 V | 40 | X | | |
| KA 09 | 62°03,25 N | 6°50,89 V | 50 | X | X | X |
| KA 11 | 62°03,5 N | 6°52,40 V | 45 | X | | |
| KA 13 | 62°03,60 N | 6°53,50 V | 38 | X | | |
| | | | | | | |
| Skálafjørður | | | | | | |
| SK 05 | 62°06,97 N | 6°44,6 V | 66 | X | X | X |
| SK 07 | 62°08,38 N | 6°44,8 V | 57 | X | X | X |
| SK 09 | 62°09,6 N | 6°45,9 V | 68 | X | X | X |
| | | | | | | |
| Kollafjørður | | | | | | |
| KO 07 | 62°06,3 N | 6°54,8 V | 28 | X | X | |
| | | | | | | |
| Sundalagið Norður | | | | | | |
| SU 37 | 62°15,1 N | 7°03,7 V | 52 | X | X | X |
| SU 41 | 62°16,5 N | 7°04,6 V | 52 | X | X | X |
| | | | | | | |
| Funningsfjørður | | | | | | |
| FU 13 | 62°16,3 N | 6°56,9 V | 39 | X | X | X |
| FU 17 | 62°15,6 N | 6°57,3 V | 25 | X | X | X |

**Fyribils úrslit:**

CTD-mátingarnar vístu, at botnlagið var uppblandað á øllum støðunum. Ongastaðni var nakað kalt botnlag at síggja. Hetta er sera sjáldsamt, so tíðliga á árinum, serliga á Skálafjørðinum. Av tí sama var nógv av oxygeni allastaðni (Talva 2), og í tí djúpa partinum av Skálafjørðinum vóru nøgdirnar tær hægstu, ið vit hava mátað hesa tíð á árinum (Mynd 2). Helst er stormur orsøkin til uppblandingina.

Á Kaldbaksfirði vóru mátaðir ymiskir fluxar ímillum sedimentið og vatnið omanfyri. Eitt av úrslitunum, ið vísir flutning av oxygeni úr vatninum og niður í sedimentið, er víst á talvu 3. Oxygennýtslan var stór, og øktist við vaksandi botndýpi. Orsøkin er, at lívrunnið tilfar verður resuspenderað á grynnri dýpi og flutt niður, har tað er djúpari, har tað síðan verður niðurbrotið.

Talva 2. Nøgdir av oxygeni á Skálafirði, Kaldbaksfirði, Kollafirði, Sundalagnum og Funningsfirði, 28. og 29. august 2007.

| Fjørður | Støð | Dýpi (m) | Oxygen (mg/l) | Metningur (%) |
|---|---|---|---|---|
| Skálafjørður | SK 05 | 5 | 11,02 | 122 |
| | - | 20 | 8,87 | 99 |
| | - | 30 | 8,59 | 96 |
| | - | 40 | 7,83 | 87 |
| | - | 50 | 7,49 | 83 |
| | - | 60 | 7,23 | 80 |
| | - | 65 | 7,09 | 79 |
| | | | | |
| | SK 09 | 5 | 10,09 | 112 |
| | - | 20 | 8,48 | 94 |
| | - | 30 | 7,89 | 88 |
| | - | 40 | 7,77 | 86 |
| | - | 50 | 7,11 | 79 |
| | - | 60 | 6,53 | 73 |
| | - | 65 | 6,38 | 71 |
| | | | | |
| Kaldbaksfjørður | KA 01 | 5 | 10,44 | 116 |
| | - | 30 | 8,51 | 95 |
| | - | 40 | 8,44 | 94 |
| | | | | |
| | KA 05 | 5 | 10,72 | 119 |
| | - | 20 | 8,79 | 98 |
| | - | 40 | 7,76 | 86 |
| | - | 50 | 6,36 | 71 |
| | - | 53 | 6,11 | 68 |
| | | | | |
| | KA 09 | 5 | 10,92 | 121 |
| | - | 20 | 8,79 | 98 |
| | - | 40 | 8,16 | 91 |
| | | | | |
| | KA 11 | 5 | 10,46 | 116 |
| | - | 20 | 8,58 | 95 |
| | - | 35 | 7,73 | 86 |
| | | | | |
| Kollafjørður | KO 07 | 30 | 8,54 | 95 |
| | | | | |
| Sundalagið suður | SU 05 | 70 | 8,46 | 94 |
| | SU 15 | 60 | 8,67 | 96 |
| | | | | |
| Sundalagið norður | SU 37 | 30 | 8,31 | 92 |
| | - | 40 | 7,87 | 87 |
| | - | 45 | 7,49 | 83 |
| | - | 50 | 7,39 | 82 |
| | | | | |
| | SU 41 | 10 | 9,25 | 103 |
| | - | 20 | 8,78 | 98 |
| | - | 30 | 7,88 | 88 |
| | - | 40 | 7,60 | 84 |
| | - | 45 | 7,38 | 82 |
| | - | 50 | 7,40 | 82 |
| | | | | |
| Funningsfjørður | FU 13 | 10 | 9,29 | 103 |
| | - | 20 | 8,91 | 99 |
| | - | 30 | 8,76 | 97 |
| | - | 38 | 8,85 | 98 |
| | | | | |
| | FU 17 | 25 | 9,17 | 102 |

Talva 3. Oxygennýtsla í botninum ymsastaðni á Kaldbaksfirði. KA 01 er úti við fjarðamunnan og KA 13 er inni í Kaldbaksbotni.

| Støð | Botndýpi (m) | $O_2$ fluxur (mmol/m$^2$/dg) |
|---|---|---|
| KA 01 | 40 | 19,2 |
| KA 07 | 52 | 37,3 |
| KA 09 | 50 | 37,1 |
| KA 13 | 38 | 21,0 |




Mynd 2. Nøgdir av oxygeni á 65 metra dýpi á støð SK05 í Skálafirði. Eingin máting varð gjørd í 1995.